Henrik Thomsen:

# Hetta koma ógvuliga dátt við

– Eg hevði í øllum førum væntað, at vit sluppu uppí part at bjóða uppá oljuhavnina. At vit ikki so frægt, sum sluppu tað, kemur ógvuliga dátt við, sigur Henrik Thomsen, nevndarlimur í Nordserv, sum ætlaði at gera oljuhavn á Drelnesi

OLJUHAVN
*Áki Bertholdsen*

– Tað kom ógvuliga dátt við, at vit ikki so frægt sum sleppa upp í part at bjóða upp á at at gera eina føroyska oljuhavn.

Tað sigur Henrik Thomsen á Tvøroyri. Hann er føroyski nevndarlimurin í Nordserv, sum ætlaði at gera eina oljuhavn á Drelnesi.

Nú tað er gjørt av, hvør sleppur at bjóða upp a at gera oljuhavn, er tað greitt, at oljuhavnin verður í hvussu so er ikki á Tvøroyri. Tí teir, sum ætlaðu at gera oljuhavnina á Drelnesi eru ikki millum tey trý feløgini, sum sleppa at bjóða uppá oljuhavnina.

Tvøramenn hava annars seinastu árini lagt eitt ovurhonds stórt arbeiði í át fáa oljuhavnina til Tvøroyrar. Men nú sær tað so út til, at alt hetta arbeiðið er til fánýtis.



*Á Tvøroyri hava tey nú í fleiri ár lagt sera stóra orku í at Drelnes skuldi verða oljuhavn. Eitt nú tóku tey seg saman við ein risa á økinum, Danbor Service, sum er eitt dóttirfelag hjá AP Møller og sum hevur yvir 20 ára royndir í oljuvinnuni. Men alt hetta tykist nú at vera til fánýtis*

## Eitt vónbrot

Henrik Thomsen sigur, at hetta er so mikið nýtt, og hann hevur heldur ikki fingið at vita, hví, Drelnes er vrakað. Tí fær hann ikki gjørt tær stóru viðmerkingarnar enn

Men hann viðgongur, at hetta er eitt stórt vónbrot.

Tað er onki galið við tí forarbeiði, vit hava gjørt. Vit hava eisini tær neyðugu fortreytirnar fyri at bjóða okkum fram. Og vit eru harafturat saman við einum vælkendum felag á økinum, Danbor Service, sum hevur verið í oljuvinnuni í yvir 20 ár.

– So hví, vit ikki so frægt, sum sleppa uppí part at bjóða uppá oljuvinnuna er eitt vónbrot.

Hann sigur, at enn hava tey ikki fingið at vita, hvat tað er, sum hevur gjørt, at Drelnes varð vrakað.

– Tað eri eg ógvuliga spentur uppá at fáa at vita, sigur Henrik Thomsen.

Men hann heldur, at talan má verða um okkurt heilt ávíst, tí fortreytirnar eru annars til staðar.

Hann sigur á teimum fundum, teir hava havt við oljufeløgini, hava teir ongantíð fingið varhugan av, at nakað var galið við tærra ætlan um oljuhavn á Drelnesi.

Hann vísir eisini á, at landsstýrismaðurin í oljumálum hevur heilt greitt gjørt vart við, at hann vil hava oljuvirksemið úti um landið.

– Men hesum hava oljufeløgini ikki tikið til eftirtektar, tí nú er tað tvørturímóti greitt, at oljuhavnin endar í miðstaðarøkinum, sigur Henrik Thomsen.

---

# Oljuvinnan tekur valdið

**Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, heldur, at oljufeløgini bróta samtykt hjá løgtinginum við at útihýsa Suðuroynni frá eini útgerðarhavn**

ÚTGERÐARHAVN
*Eyðun Klakstein*

– Oljuvinnan kann ikki byrja sítt virksemi í Føroyum við at taka valdið í landinum.

Hetta sigur løgtingsmaðurin, Hergeir Nielsen, nú oljufeløgini hava gjørt av, at ein komandi útgerðarhavn verður ikki løgd á Drelnesi, men í Havn ella á Skálafjørðinum.

– Oljufeløgini ganga beint ímóti tí, sum løgtingið hevur samtykt, heldur tingmaðurin fyri Tjóðveldisflokkin.

– Politiski viljin er, at oljuvirksemið skal verða í útjaðaranum, men tað fyrsta oljufeløgini nú gera, er at útihýsa júst útjaðaranum og leggja útgerðarhavnina í miðstaðarøkinum, sigur Hergeir Nielsen.

Hann heldur, at skulu oljufeløgini byrja við at kollrenna løgtingsins vilja, so er best, at tey halda seg burtur úr Føroyum. Avgerðina um útgerðarhavnina heldur tingmaðurin verða alt annað enn álitsvekjandi.

## Elttør skal halda lógina

– Sum tingmenn kunnu vit bara fylgja við og ansa eftir, at løgtingslógir verða hildnar, og eg taki tað sum givið, at landsstýrismaðurin í oljumálum fer at halda landsins lógir, sigur Hergeir Nielsen.

Hann sipar við hesum til, at Eyðun Elttør, landsstýrismaður, skal syrgja fyri, at oljuvirksemið verður lagt í útjaðaranum, og tá talan er um útjaðara í hesum høpi, er tað Suðuroyggin.

Hergeir Nielsen hevur tí als ikki mist mótið um, at Suðuroyggin fær útgerðarhavnina, hóast oljufeløgini í fyrstu syftu hava útihýst Drelnesi.

Løgtingið hevur samtykt, at oljuvirksemið skal verða í útjaðaranum, og tað merkir, at Suðuroyggin skal verða við, heldur Hergeir Nielsen.



*Hergeir Nielsen hevur als ikki mist mótið um, at Suðuroyggin fær útgerðarhavnina, hóast oljufeløgini í fyrstu syftu hava útihýst Drelnesi*